# Fjallafípan – útibarnagarður úti í Grøv

**Mánadagin komu tíggju tey fyrstu børnini, sum hava fingið pláss í nýggja útibarnagarðinum í Klaksvík. Stovnurin liggur úti í Grøv, og leiðarin, Jóhanna Vest, sigur, at av tí at tað er so avsíðis, so kann tað sammetast við at vera úti á bygd**



*Børnunum dámar óføra væl at geva gæsnum at eta. Tey eru byrjað at hava breyð við til tær heimanífrá*

ÚTIBARNAGARÐUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Upprunaliga vóru tað arbeiðsskúrar, men í dag eru skúrarnir blivnir til ein útibarnagarð, sum kann taka 40 børn inn. Jóhanna Vest greiðir frá, at tey nú eru í ferð við innkoyringina av børnunum.

Innkoyringin verður skipað á tann hátt, at børnini koma í bólkum upp á tíggju at gangin í útibarnagarðin hvønn mánadag, inntil øll 40 eru komin inn.

– Vit hava valt at gera tað á hendan hátt, tí vit meta, tað verða léttari bæði fyri børn og starvsfólk at koma at kennast, tá tað ikki eru so nógv í senn, sigur Jóhanna, sum byrjaði sum leiðari á Fjallafípuni tann 01. august.

Tey fyrstu tíggju komu, sum sagt, mánadagin, men tey vóru á stovninum og vitjaðu hósdagin í farnu viku. Og tey næstu tíggju, sum skulu koma mánadagin vóru so og vitjaðu fyrradagin.

– Tá vóru tey børnini, sum komu mánadagin við til at taka ímóti teimum og vístu teimum runt. Tað riggaði avbera væl, halda vit, sigur Jóhanna.

Hendan fyrsta mánaðin, meðan innkoyringin stendur uppá, ber ikki so væl til at skipa dagarnar í fastar rammur, men Jóhanna sigur, at tá øll børnini eru komin, kemur alt tað upp á pláss.

– Børnini skulu tá verða her klokkan hálvgum tíggju um morgunin, tí vit fara út klokkan tíggju og verða so úti inntil um trýtíðina seinnapartin, tá vit plaga at eta frukt.

Umstøðurnar um stovnin mugu sigast at vera avbera góðar fyri børn. Hann liggur ovarlaga úti í Grøv og rundan um stovnin er stórt øki, har børnini kunnu spæla. Har er ongin sandkassi, men har nógv runa og onkrir stórar hyljar, sum børnunum dáma væl at spæla í. Tey hava eisini gjørt runukøkur. Omanfyri stovnin er bøur – tað er bøur allastaðni rundan um hann – har gæs ganga framvið stikinum. Og børnini plaga so at geva gæsnum at eta. Eisini er seyður har í nánd.

– Børnini dáma sera væl at geva gæsnum, tey eru longu byrjað at hava gamalt breyð við, tá tey koma.

Eisini rennur ein á skamt frá stovninum, men har sleppa børnini sjálvandi bert við vaksnum.

– Tað er stik rundan um, so tey sleppa ikki til ánna. Og tað er eisini tað fyrsta vit siga við tey, tá tey koma, at tey mugu ikki fara í ánna at spæla, uttan at onkur vaksin er við.

Sum heitið sigur, so er tað ein útibarnagarður, tað vil siga, at børnini eru úti størsta partin av degnum – og so at siga í øllum veðri eisini.

Í øllum grimdarregninum hósdagin, fóru tey ein gongutúr heim á fótbóltsvøllin, har tey ótu matpakkarnar.

– Tað gjørdi ikki mun fyri børnini. Tey hugnaðu sær óført, sigur Jóhanna, sum heldur, at útibarnagarðar eru avbera sunnir fyri børnini, tí tey eru so nógv úti.

Ætlanin hjá teimum í útibarnagarðinum Fjallafípan er, at fyrst ganga túrar úti í Grøv og harvið læra seg nærumhvørvið at kenna.

Tað arbeiða sjey fólk í útibarnagarðinum Fjallafípan, umframt Jóhonnu. Stovnurin letur upp klokkan hálvgum átta og steingir klokkan eitt korter til seks.

Børnini, sum eru har eru í aldrinum trý til skúlaaldur.



*Starvsfólkafundur »ude i det blå.« Starvsfólkini, Jóhanna, Óli og Frida lata sera væl at umstøðunum í arbeiðskúrunum, sum nú eru blivnir til ein útibarnagarð*



*Børnini vóru glað við at sleppa út í góðveðrið hendan morgunin. Tá øll vóru til reiðar, fóru tey ein gongutúr*



*Óli er einasta mannfólkið, sum arbeiðir á Fjallafípuni, og honum dámar avbera væl*



Hans Johannes á Brúgv, fyrrverandi stjóri í Fiskasøluni:

# - Hetta hevði eg ikki væntað

**– Nú fari eg fyrst at finna út av, hvar eg eri. Men eg fari ikki at sita hendur í favn, sigur fráfarni stjórin í Føroya Fiskasølu, Hans Johannes á Brúgv, sum annars ikki vil siga nakað um uppsøgnina, tí hann hevur tagnaðarskyldu**



*– Hetta hevði eg ikki væntað, sigur Hans Johannes á Brúgv, sum hevur verið stjóri í Føroya Fiskasølu síðan 1. juli 1997.*

*Hann byrjaði á Fiskasøluni seinast í 1988 og hevur arbeitt undir 4 ymiskum stjórum, Birgiri Danielsen, Bjarta Mohr, Niels Sørensen og Poul Michelsen*

FISKASØLAN
*Vilmund Jacobsen*

Síðan 1. juli 1997 hevur Hans Johannes á Brúgv sitið sum stjóri í Føroya Fiskasølu, men tað er hann ikki longur.

Nevndin í Fiskasøluni, sum er Hákun Steingrímsson, formaður, Thomas Arabo og Jóhannes Jensen, hevur gjørt av at siga Hans Johannes úr starvi. Henda nevndin tók við síðst í juni, tá ið aðalfundur var í felagnum. Frammanundan hevði P/F Fiskasølan og P/F Føroya Fiskavirking somu leiðslu í nakrar mánaðir.

Fyribils stjóri í Fiskasøluni er nú Árni Arge, sum hevur verið varastjóri og fíggjarstjóri í fyritøkuni í sløk 3 ár.

Hans Johannes byrjaði á Føroya Fiskasølu síðst í 1988. Áðrenn hann gjørdist stjóri, arbeiddi hann undir fýra øðrum stjórum, nevniliga Birgiri Danielsen, Bjarta Mohr, Niels Sørensen og at enda Poul Michelsen.

Hans Johannes var sølustjóri á Fiskasøluni í hálvt annað ár, áðrenn hann gjørdist stjóri.

### Tagnaðarskyldu

Sosialurin hevði Hans Johannes í telefonini gjáramorgunin. Hann tóktist rímiliga væl hýrdur, men ásannaði skjótt, at hetta hevði hann ikki væntað, nú nevndin, sum vald varð síðst í juni, hevur valt at siga hann úr starvinum sum fiskasølustjóri.

– Eg havi tagnaðarskyldu og mínar treytir at fylgja, nú mín seinasti arbeiðsdagur á Fiskasøluni er lokin. Eg vil einki siga um uppsagnargrundirnar, men fari at vísa til nevndarformannin, Hákun Steingrímsson.

Spurdur, hvat hann nú fer at takast við, sigur Hans Johannes:

– Hetta er alt so nýtt. Í fyrsta lagi fari eg at finna út av, hvar eg eri, og síðan fari eg at taka mær okkurt fyri. Hvat tað verður,dugi eg ikki at siga beint nú, men tað er bara eitt, sum er vist; eg fari ikki at ganga fyri einki, sigur hann.

Hans Johannes á Brúgv sigur tað ikki vera óhugsandi, at hann onkusvegna kemur undan kavi aftur í fiskivinnuni.

Hákun Steingrímsson, nevndarformaður í Fiskasøluni:

# Framtíðin krevur nýtt fólk í stjórasessin

**– Vit eru ikki ónøgdir við tað arbeiði, sum Hans Johannes á Brúgv hevur gjørt, men vit halda ikki, at hann passar best inn í nýggju strategiina hjá nevndini, sigur nevndarformaðurin**

FISKASØLAN
*Vilmund Jacobsen*

Sambært Hákuni Steingrímsson er tað ikki ónøgd við arbeiði hjá fyrrverandi stjóranum á Føroya Fiskasølu, Hans Johannesi á Brúgv, sum er orsøkin til, at ein samd nevnd valdi at siga hann úr starvi.

– Hetta hevur einki við úrslitið hjá Fiskasøluni at gera, og hetta hevur heldur einki við ES-kanningina at gera, sigur hann.

Hákun Steingrímsson leggur dent á, at nevndin arbeiðir við eini sonevndari strategi, sum í løtuni er í stoypiskeiðini.

– Vit eru ikki lidnir at viðgera hesa strategiina enn, men vit halda, at tað skulu verða nýggj fólk, sum skulu føra tær ætlanir, nevndin hevur, út í lívið.

Hákun sigur, at uppsøgnin av Hans Johannesi hevur nakað við framtíðina og framtíðarætlanir at gera.

– Vit fara sjálvsagt ikki at útgreina hesar ætlanir nærri, fyrr enn tær eru komnar úr aftur stoypiskeiðini, og óvist er, um vit nakrantíð fara at leggja tær út á okkara heimasíðu, sum Hákun tekur til.

### Óvist, hvør maðurin verður

Spurdur, um Árni Arge, sum fyribils er settur stjóri í Fiskasøluni, verður maðurin, sum skal føra nýggju ætlaninar hjá Fiskasøluni út í lívið, sigur Hákun, at tað er ov tíðliga at siga nakað um enn.

Neyvari spurdur, hví nevndin avgjørdi, at tað ikki skuldi vera Hans Johannes á Brúgv, sum fekk henda møguleika, tá ið nevndin annars ikki er ónøgd við arbeiði hjá honum, sigur Hákun:

– Vit halda, at tað er ein onnur »typa« av fólki, vit hava brúk fyri, og hvør rætti persónurin er til júst hesa uppgávuna, vita vit ikki, fyrr enn endaliga ætlanin fyriliggur, sigur hann.

Tá ið Sosialurin greiddi Hákuni frá, at Hans Johannes ikki hevði væntað sær hesa uppsøgn, segði hann:

– Nú veit eg ikki, hvat Hans Johannes hevur hugsað, men eg vil ásanna, at hóast nevndin var samd, var tað ein keðilig uppgáva at skula siga hann úr starvi.